# royskt neytakjøt



*„ – Eg hevði ynskt, at handlar og fólk keyptu tað føroyska neytakjøtið. Men hvat, – tá teir fáa tað bíligari úr útlandinum, hvat er so at gera við tað?!*

## Riggaði væl við mjólkabilinum



*– Føroysku neytini er væl fóðrað, og tí er kjøtið eisini so gott, sigur Jørmundur*

Nógv er hent innan føroyskan landbúnað, síðani Jørmundur bygdi fjós sítt fyri 32 árum síðani.

Ein serlig broyting var, tá mjólkabilarnir fingu møguleika at koyra til fjósdyrnar eftir mjólkini, og tað enntá fleiri ferðir um vikuna.

Hetta hendi, tá framburðssinnaðir hestmenn koma við áheitan og fingu játtan til gerð av góðari og tryggari samferðsluhavn, har bilferjur eisini kundu leggja at landi.

– Frammanundan høvdu vit havt mjólkadunkar. So tú skilir, at hetta var ein stór broyting og lætti fyri okkum.

–Hetta við mjólkabilinum riggaði avbera væl, sigur Jørmund.

## Fýra listaverk fyri 37.000 kr.

**Bláikrossur:** Á eystanstevnu næstseinasta vikuskifti skipaði Bláikrossur fyri stórari gospelkonsert. Umframt konsertina var eisini uppboðssøla av málningum.

Á konsertini vóru munandi færri áhoyrarar enn í fjør, men hinvegin so skortaði ikki hugur at bjóða uppá málningarnar á uppboðssøluni. Henda gekk munandi betri enn væntað.

Tá gjørt varð upp fyri uppboðið vóru komnar inn 37.000 kr. fyri teir fýra málningarnar, sum seldir vórðu hesa løtuna.

Bláikrossur upplýsir, at tann dýrasti málningurin fór fyri ikki minni enn 15.000 kr. Allur peningurin fer til hjálpararbeiðið, sum felagsskapurin ger her á landi.

**sb.**

## Tvey fyri eitt

**Vestmanna:** Í hesum døgum er Føroya Sparikassi farin undir eina útbygging í garðinum vestanfyri. Hetta arbeiðið verður væntandi liðugt tíðliga í heyst, verður upplýst úr Vestmanna.

Í samband við hetta arbeiðið hava fólk frá kommununi nýtt høvið til at skifta ein part av gomlu betongrørunum, sum liggja í garðinum, út við nýggj úr plastikki.

– Hetta er ein liður í spillvatnsætlan okkara, sum er frá 1998. Henda ætlan inniber at vit leggja tær gomlu áirnar, sum higartil hava virkað sum kloakkir, í rør soleiðis sum heilsumyndugleikarnir krevja, sigur Vestmanna kommuna.

Hetta er eitt rættiliga umfatandi arbeiði. Men sum sagt verður: Gera vit eitt petti ísenn, koma vit á mál einaferð!



*Samstundis sum Sparikassin skal byggja út, arbeiðir Vestmanna kommuna við at røkka ætlanini um spillivatn í bygdini*